


# Hilmar Jan Suni Hansen • 39 ár • Freelance alt møguligt

Lýs teg sjálvan við trimum orðum:
– Tað vera 4 orð: raskur, dovin, døllutur, skjótur

Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast:
– Tað gongur nokk

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
– Uha... Øllum, sum eg kann síggja

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
– Millum 2 og 20 minuttir

Hvat stressar teg?
– Tá eg einki havi at tríva í

Hvat gleðir teg?
– Tá tað gongst væl. Bæði hjá mær og hjá øðrum

Nær feldi tú seinast eitt tár?
– Tað var tá vermamman doyði í januar

Nær smakkaði tú tær seinast á, ella vart í vertskapi?
– Eg eri í vertskapi í heilum, minnist ikki akkurát nær eg var seinast

Hvat var seinasta ynski, sum tú fekst uppfylt?
– Tað var, tá tú ringdi og spurdi, um eg vildi vera í bláa stólinum

Hvat er besta uppfinning og hví?
– Djúpi tallerkurin, tí hann tekur meiri enn tann flái

Títt besta heimaráð?
– Tá tú steikir, steik so spakuliga og leingi

Hvat hevur tú í lummunum beint nú?
– Beint nú havi eg bara fartelefonina

Nær sendi tú seinast eitt sms og til hvønn
– Tað var leygardagin, tá eg sendi sms til Rana Nolsøe

Hvør eigur ársins mest láturliga úttalilsi til fjølmiðlarnar?
– Tað kann ikki vera nakar annar enn Jógvan við Keldu. Men tað er kanska meiri grátiligt enn láturligt

Hvør er lekkrast í Føroyum?
– Tað er Maria, abbadótturin. Bæði nú, men eisini tá hon verður eldri

Hvussu loysa vit trupulleikarnar hjá suðuroyingum?
– Kanska um vit flyta allar norðoyingar til Suðuroyar at búgva í 1/2 ár, so tey síggja hvussu deiligt og pent tað er har suðuri. So høvdu tey kanska verið meiri sinnað at hjálpt suðuroyingunum

Eigur Todi at vera á landsliðnum?
– Sjálvandi! Alt annað er langt úti

Hvørjum heldur tú við í Formula-deildini?
– Nsí

Gongur tú høgt upp í móta?
– Nei, tað er synd at siga. Eg eri ikki móti móta, men eg gangi ikki høgt uppí tað

Hvat fert tú at gera, tá tú verður stórur?
– Tað havi eg slett ikki hugsað um enn.. Eg hopi ikki, at eg blívi nógv størri